# Rowan
# – følið menniskja aftan fyri ráa lookið



*Mynd: Finnur Justinussen*

**Ólavsøkukonsertin:** Nú haldi eg, tað er tíð upp á, at eg komi heim til Føroya, og vísi hvør eg eri, sigur Róin Siggertsson, alias Rowan, sum fer á pall leygarkvøldið at spæla nýggjan tónleik á fyrsta sinni fyri føroyskari fjøld á ólavsøkukonsertini

Hansara image er ikki til at fara skeivur av. Hárið langt, skeggstubbarnir passaliga forsømdir og eyguni hvøss. Soleiðis sær ímyndin av einum vandamiklum rockara út. Men hvat við persóninum sjálvum?

*Er kanska ein harður hundur eisini?*

Slettis ikki. Heldur tvørturímóti.

Rowan, alias Róin Siggertsson, dylir ikki fyri, at hann er sensitivur.

– Eg fái nóg illa hugt eftir sjónvarpstíðindum, so takið eg tað, eg síggi, at mær. Eg má viðganga, at 11. sept. 2001 hevur havt stóra ávirkan á meg. Hetta hoyrist eisini aftur í tónleikinum eitt nú á einum nýggjum lagi Mess On A Scene, sum vit fara at spæla leygarkvøldið.

*Hvat er tað so fyri tónleikur, fólk kunnu roknað við at hoyra leygarkvøldið?*

– Fyrst og fremst løg, eg havi skrivað tvey tey seinastu árini. Onkur hevur sagt við meg, at tað er ræðuliga rockutt, men ikki rockur. Tað er rættiliga funky, men ikki funkur. Ja, eg haldi, tú kanst í roynd og veru kalla tað popp. Men eg fari út í krókarnar, út í periferiina. Tú kanst siga, at boðskapurin er kærleiki, men eg eri sum sagt øgiliga ávirkaður av gogndini í heiminum. Tað haldi eg hoyrist aftur bæði í teksti og eisini í sjálvum tónleikinum.

– Hetta er tónleikur eg sitið og arbeiði við einsamallur í mínum egna studio í Danmark og nú gleði eg meg rættiliga at fáa roynt tað av við einum orkestri.

## Navnið

Rowan er sum sagt alias Róin Siggertsson. 29 ára gamli vestmenningurin, sum seinast var at síggja á donsku sjónvarpssendingini Rockidoler í februar, har hann av álvara gjørdi vart við seg.

*Hví Rowan, Róin?*

– Tað er ongin loyna, at í Danmark – og fyri sovítt alla aðrastaðni í verðini – gevur navnið hjá mær komplikatiónir.

– Í Danmark verið eg bert kallaður Rowan og so havi eg gjørt av, at brúka hetta sum mítt kunstnaranavn. Í bankanum og aðrastaðni eri eg framvegis Róin. Longri er tann søgan ikki.

## Glaður fyri ikki at verða valdur

Fyri at venda aftur til sendingina Rock Idoler, sum TV3 sendi, so varð Rowan ikki millum tey útvaldu, men hann fekk skoðsmál frá fakfólkum, ið staðfestu, at hann at kallað var 'ov góður' til at verða útvaldur. Maðurin var størri enn konseptið, hildu tey kønu.

– Í dag eri eg glaður fyri, at eg ikki bleiv valdur út. Tað hevði slettis ikki gingið. Tað dugi eg væl at síggja. Eg hevði ikki passa inn undir handan formin, sigur Rowan.

Luttøkan gav kortini Rowan vind í seglini. Fólk í donsku bransjuni byrjaðu at tosa saman. Hann fekk ein persónligan managara, og 6. aug. fer Rowan til Danmarkar at spæla inn trý løg saman við amerikansk-danska guitarleikaranum Billy Cross, ið eisini hevur útmerkað seg sum produsara á mongum norðurlendskum útgávum.

– Ja, luttøkan setti hol á ymisk ting. Havi rakt við ymiskt nýtt í mær sjálvum. Eitt nú havi eg fingið meira power á stemmuna. Óli Poulsen, sum eg arbeiddi saman við eitt mundið, var serliga tann sum hjálpti mær at opna meira upp fyri røddini, leggur Rowan aftrat.

– Í dag dámar mær væl at veksla millum at syngja út og so halda eitt sindur aftur.

## Bassist við úr Danmark

Við sær úr Danmark hevur Rowan eisini danska bassleikaran Casper Hansen, ið man vera mest kendur sum onnur helvtin av bólkinum Drori-Hansen Furniture, har Erann DD við hin helvtin. Apropos Erann, so vera tað James Olsen og Casper Hansen, ið fara at leggja botnin undir tónleikinum hjá Rowan. Aftrat tí hevur Rowan eisini Brand Jacobsen, ið fer at spæla percussion og so argentinska guitarleikaran Valentin Cora, sum rættiliga hevur gjørt vart við seg her á landi seinastu tíðina.

– Teir hava allir fingið eina fløgu við løgunum at lurta eftir. Nú gleði eg meg eisini at spæla, tí allir tykjast at vera sera tendraðir, sigur Rowan. Sjálvur fer hann eisini at spæla akkustiska guitar.

## Skal vera nú

Hetta verður sum sagt fyrsta ferðin, at Rowan av álvara kemur heim at spæla fyri lurtandi fjøld. Tað vil siga, at hann var heima í fjør og spældi í Kagganum, men hetta var meira sum tónleikur afturvið øli. Hesaferð skal tað í minsta lagið vera øvugt.

– Eg haldi, tað tykist sum tónlistarliga veðurlagið er broytt í Føroyum. Nú hoyrist um spælingar, har fólk koma fyri at lurta, fyrst og fremst. Hetta er týðandi fyri meg, tí í fleiri ár spældi eg ikki annað enn kopitónleik, har fólk bara komu fyri at drekka seg fullan. Tann kvotan er uppbrúkt.

Seinastu mongu árini hevur Rowan tó arbeitt burturav við sínum egna tónleiki. Hann hevur uppbygt sítt egna studio í Keypmannahavn. Fyri at fáa alt at bera til fíggjarliga, hevur hann eisini undirvíst í tónleiki. Hetta ger hann framvegis hálva tíð.

Hann dylir kortini ikki fyri, at ambitiónirnar eru stórar.

– Ja, eg eri ekstremt seriøsur. Tað kann onkuntíð vera ein trupulleiki fyri meg og kanska serliga menniskjuni kring meg.

– Eg eri 29 ár. Eg føli, sum nú er tíðin har tað skal henda, um eg vil gera karrieru við mínum tónleiki. Mítt mál hevur verið at fáa plátusáttmála, og tað trúgvi eg eisini uppá. Haraftrat havi eg onki ímóti at arbeiða sum produsari og arrangør á ymsum projektum.



Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!







Tú ert millum 13 og 25 ár. Alt annað er líkamikið. Dámar tær 1nú romantiskar tónar, tá ið tit eru 2eini? Ert tú tann seigi, sum einsamallur 3vur í Ormin Langa, ella hin bragdliga, sum altíð skalt 4 nakrar flatar? Setur tú hvørt 5oyra inn á kontu ella keypir tú heldur 6tanda parið av diesel-buksum? Nýforelskaður og í 7. himni, ella bert tú als ikki 8 fyri at vera single? Eisini líkamikið! Fá tær bara eitt av spildur9 +kortunum frá Føroya Sparikassa. Tú kanst velja millum 10! Við egnum nick-navni, sjálvandi ;)

Bílegg títt +kort í Føroya Sparikassa. Eisini um tú hevur eitt frammanundan. Hav eina passmynd av tær sjálvum við. Tú fært nýggju stakfløguna hjá Brandi Enni beinanvegin – ókeypis!

**Atgongumerki til konsertirnar hjá Brandi Enni, 28. juli, fáast í Føroya Sparikassa.**

**Plusspakkin:** Í plusspakkanum eru tvær kontur og eitt +kort. Fyrra kontan, +Spar, er bundna sparikontan. Seinna kontan er +Kontan. Hon er brúkskonta við tínum serstaka +korti.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo